# Til reiðar, reiðarin?

## Seks skjótir spurningar til reiðaran

*Lagt tilrættis: Dagfinn Olsen*

**Navn: Ólavur Petersen**
**Felag: P/F Vesturvón**
**Skip: Vesturvón, Akranes, Dragasund, Vesturleiki, Vestursøki**

1. *Hví ella hvussu gjørdist tú reiðari?*
   Felagið er í familjuni og eg havi altíð havt áhuga fyri arbeiðinum í felagnum. Eg byrjaðu sum reiðari í 1988.

2. *Hvussu ofta um vikuna etur tú fisk?*
   Tvær ferðir um vikuna.

3. *Hevur tú verið til skips?*
   Ja

4. *Roykir tú og drekkur tú nakað sterkari enn kaffi?*
   Eg royki ikki, men eg kann taka eina øl. Nakað sterkari leggi eg ikki í.

5. *Er javnstøðulógin galdandi umborð á skipum og skal hon tað?*
   So mugu skipini umbyggjast, tí konufólk skulu hava egið baðirúm. Tað er ikki møguligt í løtuni. Men annars hava konufólk verið og biðið um tjans.

6. *Er olja undir Føroyum og hvørja ávirkan fær møgulig oljuvinna á fiskivinnuna?*
   Vit missa kanska fólk, men tað hendir neyvan nakað tey næstu 10 árini.



**Navn: Ragnar Olsen**
**Felag: P/F Beta**
**Skip: 5 sonevndar cubabátar, umframt teir báðar nýggju; Stelkur og Bakur**

1. *Hví ella hvussu gjørdist tú reiðari?*
   Eg fekk tilboð um at arbeiða innan felagið. Tey flestu vita kanska, at pápi mín var undan mær. Men hetta er tó ikki ein familjufyritøka. Eftir at hava verið bankamaður í 18 ár gjørdi eg av, at um eg skuldi royna okkurt annað, so var tíðin komin.

2. *Hvussu ofta um vikuna etur tú fisk?*
   Eina ella tvær ferðir um vikuna.

3. *Hevur tú verið til skips?*
   Ja, umleið tveir mánaðar í alt.

4. *Roykir tú og drekkur tú nakað sterkari enn kaffi?*
   Nei.

5. *Er javnstøðulógin galdandi umborð á skipum og skal hon tað?*
   So vítt eg veit er hon ikki galdandi fyri privat virksemi og annars er svarið nei.

6. *Er olja undir Føroyum og hvørja ávirkan fær møgulig oljuvinna á fiskivinnuna?*
   Eg giti at olja er. Oljuboringar á fiskileið fara at órógva og oljuvinnan fer at taka fólk frá fiskivinnuni. Og annars kann møgulig oljuvinna óivað órógva lønarlagið.



**Navn: Torleif Sigurðsson**
**Felag:**
**Skip: Pison, Kvik, Fiskimúli**

1. *Hví ella hvussu gjørdist tú reiðari?*
   Eg var saman við øðrum við til at keypa skip, eg haldi tað var í 1990, og eg átók mær so reiðarauppgávuna.

2. *Hvussu ofta um vikuna etur tú fisk?*
   Um tú hugsar um fiskarættir sum heild, so einar 3 til 4 ferðir um vikuna.

3. *Hevur tú verið til skips?*
   Ja, men eg havi ongantíð verið fiskimaðir.

4. *Roykir tú og drekkur tú nakað sterkari enn kaffi?*
   Eg havi ongantíð roykt, men eg kann gott drekka okkurt sterkari enn kaffi.

5. *Er javnstøðulógin galdandi umborð á skipum og skal hon tað?*
   Eg kann svara soleiðis, at konufólk hava verið til skips við línubátum, sum eg havi verið reiðari á. Men annars lati eg tann spurningin upp til skiparan.

6. *Er olja undir Føroyum og hvørja ávirkan fær møgulig oljuvinna á fiskivinnuna?*
   Roknast kann við, at fólk heldur fara at arbeiða í oljuvinnuni, heldur enn at fiska, um tað gerst meira lønandi. Men eg trúgvi ikki, at fiskivinnan nakrantíð dettur niðurfyri í Føroyum.















